# Rættarkensla og meirnýtsla á almanna- og heilsuøkinum

**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður



Dimmalætting setir í oddagrein síðsta vikuskifti spurnartekin við um Føroyar eru eitt rættarsamfelag. Ført verður fram, at um fylgjan av niðurstøðuni hjá Landsstýrismálanevndini ikki verður, at landsstýrismaðurin í heilsumálum verður koyrdur til hús beinanvegin, so skaðar hetta føroysku rættarkensluna.

Hetta sama sjónarmið er eisini ført fram av andstøðuni í Løgtinginum. Tað er tó væl skilligt at andstøðan roynir at sáða iva um virksemi, trúvirði og hegni hjá landsstýrinum.

Men tað er óheppi at almenningurin situr eftir við eini fatan av, at nakað óreiðiligt er farið fram hesa tíðina meðan eg havi sitið sum landsstýrismaður. Tí vil eg koma við mínum viðmerkingum til málið.

**Løgtingið góðkennir ársroknskapin**

Málið byrjaði í mars við at Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður fyri Tjóðveldi, sendi eina kæru til Landsstýrismálanevndina um meirnýtsluna á grein 8, almanna- og heilsumál, tey seinastu 4 árini.

Fólk skulu minnast til, at á hvørjum ári viðgerð Løgtingið ársroknskapin fyri undanfarna ár. Í tí sambandi hevur Landsgrannskoðanin skrivað eina gjølla frágreiðing um øll frávik millum játtan og nýtslu á hvørji einastu konto á fíggjarlógini. Stovnar og aðalráð hava verið við til at framleitt hetta tilfarið, sum Løgtingið síðani hevur tikið støðu til, tá ið ársroknskapurin endaliga verður góðkendur.

Allar játtanir, sum Løgtingið hevur ásett, skulu haldast. Hetta er tann greiði boðskapurin, sum allir stovnsleiðarar hava fingið og sum eg veit, at teir eisini gera sítt allar besta fyri at røkka. Men tað kunnu verða serligar orsøkir, sum gera seg galdandi, at játtanin ikki heldur. Tað kunnu verða metingar, sum ikki hava hildið ella serstøk viðurskifti, sum stovnsleiðslurnar ikki hava kunnað forútsæð, t.d. óvæntaðar príshækkanir, óvanligur tørvur, serstøk starvsfólkaviðurskifti ella líknandi.

Almanna- og heilsuøkið umsitur veitingar og tænastur til tey allar veikastu í okkara samfelagið. Tað er sjáldan møguligt at gera broytingar innan hesi øki í eini knappari vending, uttan at hetta fær víttfevndar fylgir fyri mannalagnur. Í frágreiðingunum, sum Løgtingið hevur fingið frá Landsgrannskoðanini, eru hesi viðurskiftini nærri greinaði.

**Meirnýtsla ein generellur trupulleiki á øllum málsøkjum**

Endamálið við at vísa á, at meirnýtslan á grein 8 ikki hevur verið størri enn á øðrum greinum á fíggjarlógini, er ikki fyri at koma við undanførslum. Endamálið hevur einans verið at seta meirnýtsluna á grein 8 í ta samlaðu heildina, og vísa á at trupulleikin er tann sami innan øll øki á fíggjarlógini. Tá hugsað verður um, hvat grein 8 viðvíkur, so er hetta kanska at undrast yvir. Men soleiðis er tað.

Grein 8 hevur havt meiri enn helvtini av fíggjarlógini, og hevur verið nógv tað største einstaka málsøkið hjá nøkrum landsstýrismanni. Tað er tí eyðvitað, at landsstýrismaðurin, sum fyrisitur hesa greinina á fíggjarlógini, hevur fingið størri uppmerksemi í mun til onnur øki.

Talva 1 vísir upplýsingar úr leiðslukunningarskipanini fyri tíðarskeiðið 2005-2008.

Sum tað framgongur av talvuni omanfyri hevur meirnýtslan á § 8 verið lutfalsliga lægri enn á øðrum greinum á fíggjarlógini. Grein 8 hevði 52% av samlaðu fíggjarlógini men 50% av tí samlaðu meirnýtsluni.

Í 2007 var meirnýtslan serliga stór innan heilsuøki. Orsøkin til hetta var m.a., at tá var løgtingsval útskrivað fyrst í desember mánaði og ein eykajáttan, sum lá til viðgerðar í Fíggjarnevndini datt burtur. Hon var upp á íalt 24,3 mió.kr.

Verður hugt at meirnýtsluni á fíggjarlógini árini 1997-2008, so sæst á strikumyndini (mynd 2), at meirnýtslan hevur ligið millum 0,5 til 3 prosent. Tað framgongur eisini, at procentvísa meirnýtslan í 2007 og 2008 hevur verið lutfalsliga hægri enn frá 2000 til 2006. Men tað er ikki innan almanna- og heilsuøkið at nýtslan hevur verið størri enn á øðrum økjum.

Fleiri eykajáttanir eru heldur ikki játtaðar til § 8 í mun til aðrar greinar á fíggjarlógini. Í tíðarskeiðinum 2005 til 2008 er lutfalsligi parturin til § 8 í alt 36% av teimum samlaðu eykajáttanunum, hóast § 8 í sama tíðarskeiðið hevur haft umleið 52% av samlaðu fíggjarlógini. Tølini eru tikin úr leiðslukunningarskipanini. Talva 3.

Tað sum her er skrivað, er ikki ein undanførsla fyri at afturvísa at meirnýtsla hevur verið.

Men tá ið Dimmalætting setur spurnartekin við um Føroyar eru eitt rættarsamfelag, so er tað eisini týdningarmikið at vísa á, at ein meginregla í rættarsamfelagnum er, at øll eru líka fyri lógini. Rætturin má verða tann sami fyri Hans Paula Strøm, sum fyri onnur sum hava sitið við ábyrgd hesi árini.

Talva 1

| Meirnýtsla og játtan (mió. kr) | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2005-08 íalt |
|---|---|---|---|---|---|
| **Meirnýtsla á §8** | -18,6 | -23,3 | -65,4 | -62,4 | **-168,8** |
| **Meirnýtsla á øðrum greinum** | -22,8 | -25,0 | -56,7 | -62,7 | **-167,2** |
| **Meirnýtsla á fíggjarlógini íalt** | -40,4 | -48,4 | -122,1 | -125,1 | **-336,0** |
| **%-partur hjá § 8 av meirnýtsluni** | 44% | 48% | 54% | 50% | **50%** |
| **Játtan á § 8** | 1.941 | 1.989 | 2.065 | 2.270 | **8.264** |
| **Játtan á øðrum greinum** | 1.712 | 1.850 | 2.006 | 2.150 | **7.718** |
| **Játtan á fíggjarlógini íalt** | 3.652 | 3.839 | 4.071 | 4.419 | **15.981** |
| **%-partur hjá §8 av allari fíggjarlóg** | 53% | 52% | 51% | 51% | **52%** |
| **% meirnýtsla á §8 í mun til játtan á §8** | -0,9% | -1,2% | -3,2% | -2,8% | **-2,0%** |
| **% meirnýtsla á øðr. greinum í m.t. játtan** | -1,3% | -1,4% | -2,8% | -2,9% | **-2,2%** |

Mynd 2




Talva 3

| Eykajáttanir, mió. kr. | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2005-2008 íalt |
|---|---|---|---|---|---|
| **Eykajáttan §8** | 24.027 | 23.707 | 19.910 | 38.999 | **106.643** |
| **Eykajáttan á øðrum greinum** | 29.564 | 67.173 | 46.940 | 46.638 | **190.315** |
| **Eykajáttan á fíggjarlóg íalt** | 53.591 | 90.880 | 66.850 | 85.637 | **296.958** |
| **%-partur hjá §8 av eykajáttan íalt** | 45% | 26% | 30% | 46% | **36%** |